

*Uni Vestureið, politiinspektørur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Politiið greiddi frá hendingunum nýggjársnátt

**Á tíðindafundinum hjá fútanum í gjár greiddi Uni Vestureið Politiinspektørur frá gongdini Nýggjársnátt, tá manningin á Lómi varnaðist ein druknaðan mann á sjónum.**

DRUKNIVANLUKKA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í sambandi við druknivanlukkuna nýggjársnátt og handfaringina hjá løgregluni av málinum, hevði fútin bjóðað føroysku miðlunum á tíðindafund kl. 11 í gjáramorgunin. Á fundinum vóru samrøðurnar millum løgregluna og Havnarskrivstovuna spældar av. Í blaðnum í gjár prentaðu vit avrit av samrøðunum. Umframt at fútin Karen Marie Olesen boðaði frá, at hon ikki metti nakra orsøk vera til at finnast at avgerðunum hjá vakthavandi á løgreglustøðini nýggjársnátt, greiddi Uni Vestureið politiinspektørur frá, hvussu kanningarnar av hendingunum og embætisførsluni hesa náttina vóru gjørdar.

Samrøður við alarmsentralin verða allar bandaðar, men samrøðurnar hesa náttina vóru ikki til alarmsentralin, men til beinleiðis telefonina hjá løgregluni. Tílíkar samrøður verða bandaðar á minidisk, men tað er ikki altíð, at minidiskarnir verða skiftir rættstundis. Tí var upprunaliga ivi, um samrøðurnar vóru til. Hetta sást eisini á upprunaligu útsøgnunum hjá løgregluni. Tá ljóðaði nevniliga, at samrøðurnar ikki vóru bandaðar. Tilfarið á minidiskinum er vart av tagnarskyldu, men báðir partar í samrøðuni, høvdu givið sítt samtykki til, at samrøðurnar vórðu spældar av á tíðindafundinum.

Eisini greiddi Uni Vestureið um gongdina hesa náttina. Maðurin, ið druknaði var komin av skipi á Klaksvíkina dagin fyri og fór til Havnar, har hann hevði fingið logi. Hann skuldi suður við Smyrli nýggjársdag. Á loginum var einki tekin um, at maðurin hevði sovið har ella yvirhøvur verið har aftur eftir, at hann var komin har av fyrstan tíð 30. desember. Maðurin varð síðst sæddur í miðbýnum í Havn kl. 22.30, tá hann varð settur av í Steinatúni. Fartelefonin var sløknað, og hann segði seg skula á logiið, at løða sær hana aftur. Hann varð ikki sæddur aftur á lívi. Tveir tímar seinni legði Lómur at bryggju í Havn. Vakthavandi á Havnarskrivstovuni var á økinum eina góða løtu áðrenn hetta, hann gjørdi økið klárt og tók millum annað eina presending upp úr sjónum, ið lá har og fleyt. Har var einki óvanligt at síggja. Tá farmaskipið Lómur kom at, legði skipið at við gronini fyrst, og brúkti síðani megina frá skrúvuni at fáa hekkuna at. Her er talan um nógv megi, og tí varð alt, ið lá á botni pískað upp, og tað var tá, at manningin varnaðist ein kropp á sjónum. Manningin og vakthavandi á Havnarskrivstovuni leitaðu síðan við lykt, men kroppurin var sokkin aftur. Havnarskrivstovan ringdi síðan til løgregluna og spurdi um nakar var saknaður og nevndi, at teir kanska ringdu til sløkkiliðið, og fóru at leita víðari við sterkari lykt. Á Løgreglustøðini í Havn var nógv at gera hesa løtuna, tí Nýggjársnátt vóru nógvar fráboðanir. Løgreglan gjørdi ikki meira við málið fyrr enn kl. 6.45, tá Havnarskrivstovan ringdi aftur, og tað gjørdist greitt fyri vakthavandi, at talan heilt víst var um ein mannakropp. Tá var vaktarskiftið á løgreglustøðini og á Havnarskrivstovuni, tí vórðu boðini um kroppin givin víðari til næstu vaktina á báðum støðum. Løgreglan var tó ikki greið yvir, at Sløkkiliðið hevði dagført sína útgerð, soleiðis at leitast kundi um náttina. Tí varð sløkkiliðið ikki boðsent fyrr enn tað lýsti í.

Maðurin varð funnin um kl. 14 Nýggjársdag. Á tíðindafundinum greiddi Uni Vestureið frá, at tann druknaði ongar snuddir hevði ella aðrar umstøður, ið góvu ábendingar um at talan av um annað enn, at maðurin var druknaður. Hann greiddi somuleiðis frá, at av tí at eingi vitni vóru til hendingina, var ómøguligt at endaliga staðfesta, hví maðurin var endaður á sjónum. Vevmyndatólini hjá Havnarskrivstovuni vóru óvirkin, og vevmyndatólið hjá Tryggingini, ið eisini kundi givið ábendingar, goymir ikki myndirnar, men sendir tær beinleiðis út á alnetina. Uni Vestureið segði seg vóna, at um onkur hevði upplýsingar um málið, at viðkomandi fór at seta seg í samband við løgregluna.


Sunnudagin 14. januar kl. 19.00

Amin Jensen á Rio Bravo



Veitslumenn

**Forrættur:**
**Kalvamousse í roykturn laksi, borðreitt við safrandressingi og heimabakaðum breyði**

**Høvuðsrættur:**
**Djóralundir við pipar-bláberjasós, borðreitt við waldorfsalati í tomat, soppum og stoktum eplum**

**Omaná:**
**Heitt bananasplit við portvíni**



*Uppliv ein skemtara í heimsklassa - Amin Jensen undirheldur í matstovuni meðan tit njóta ein betri bita!*

*3 rættir + undirhald*
*385,-*

*Bílegg borð á tel 319767/ 212955*

RIO · BRAVO RESTAURANT
· Beef & Steak House ·
Tórsgøta 11 · Tórshavn · Tel 31 97 67 · www.riobravo.fo

Kundaráðgevi
við dagligari leiðslu

Vilt tú hava ábyrgd av at røkja sambandið við 20 prosent av kundum okkara í høvuðsstaðnum?

Eik



Framsøkin og samstarvandi
Eik søknast eftir dagligum leiðara til deildina í Hornabø. Umframt dagligu ábyrgdina av deildini, verður tú eisini kundaráðgevi.

Tín leiklutur krevur samstarv og rættar avgerðir. Roknast kann við spennandi avbjóðingum og ávísum arbeiðstrýsti.

Tínir eginleikar
- Tú ert jalig/ur og uppsøkjandi
- Tú hevur dirvi
- Tú hevur peningastovnsútbúgving ella líknandi útbúgving

Starvið verður sett skjótast møguligt, og umsóknarfreistin er 22. jan. 2007 kl. 12.00. Løn sambært avtalu.

Tosa við
Sæunn L. Petersen, varaleiðara í Tórshavn, tel 348020, saunn.petersen@eik.fo

Les meira um starvið á www.eik.fo